## Møti í Vestmanna um vikuskiftið

Komandi vikuskifti vera áhugaverd møtir í Auluni í skúlanum í Vestmanna. Tað eru teir somu sum høvdu møtir í apríl mánaði í ár: Rógvi Joensen, Bogi Simonsen, Petur Mohr og Petur á Roykheyggi. Tað vera tvey møti hesaferð, byrjað verður leygarkvøldið kl 20:00 og hildið verður fram sunnukvøldið klokkan 18. Kristina Bærendsen og Asta Højgaard vera við á møtunum við sínum framúrskarandi røddum og sangkynstri. Tær eru kendar frá festivalum og størri sangmøtum. Talarar vera Rógvi Joensen Klaksvík, Bogi Simonsen Klaksvík, Jákup Hansen Klaksvík og onnur úr Vestmanna. Hetta eru talarar, sum eru kendir runt um í landinum og sum eisini luttóku tá ið møtirøðin var fyrr í ár. Fyrireikarnir vóna at síggja so nógvar vestmenningar og onnur, sum til ber. Endamálið við møtunum er at boða gleðiboðskapin um Jesus Kristus, til ein tystan heim. Eftir hvørt møtið verður ein kaffimunnur við onkrum afturvið, og høvi verður til samtalur og forbøn. Øll eru hjartaliga vælkomin til hesi møtir.

# Fiskur til pensjónistar og fátøk



*Tað kemur væl við hjá pensjónistum og fátækum at fáa fiskamat*

**Mick Mahon hevur verið fiskimaður í meira enn 40 ár. Hann vil ikki tveita góðan fisk útaftur orsakað av eini kvotaskipan, sum leggur upp til útblaking**

KVOTUR
*Vilmund Jacobsen*
*vilmund@sosialurin.fo*

Fiskimaðurin Mick Mahon úr Newlyn í Onglandi er ógvuliga hart ímóti kvotaskipan í fiskivinnuni. Hann eigur 29 fót stóra trolbátin J-Anne og vil ikki blaka ein tann einasta ein fisk útaftur, sum kann etast. Hann vil heldur taka fiskin til lands og geva pensjónistum og fátøkum hann at eta.

Mick er til reiðar at taka við revsing og bót, sum svarar til 50.000 ensk pund, um tað gerst neyðugt. Hann vil einki hava fyri fiskin, sum hann gevur burtur, men um fólk vilja lata okkurt til vælgerandi endamál, eitt nú til Sjómansmissiónina, er hann fegin um tað.

- Tað er ímóti míni sannføring at tveita fisk útaftur, og eg kenni meg sviknan av mínum politikarum. Vit eiga nakrar av bestu fiskigrunnunum í heiminum, og kortini er øll fiskivinnan við at fara av knóranum, sigur maðurin, sum hevur verið fiskimaður í meira enn 40 ár.

Tað er heimasíðan fishupdate.com sum ber hesi tíðindi.

# Íslendingar fiska minni

ÍSLAND
*Vilmund Jacobsen*
*vilmund@sosialurin.fo*

Fyrstu sjey mánaðirnar í ár landaðu íslendsk skip tilsamans 152.944 tons av fiski. Hetta er ein minking í mun til somu mánaðir í fjør upp á 8%.

Størstu nøgdirnar eru makrelur og sild, nevniliga 118.000 tons.

Landingarnar av upsa, toski og hýsu í hesum tíðarskeiði vóru ávikavist 9.000, 7.000 og 6.000 tons.

Um hesi tøl eru røtt, sum FiskeribladetFiskaren endurgevur úr Morgunblaðnum, er talan um sera lítla toska-, hýsu- og upsaveiði í íslendskum sjógvi fyrstu sjey mánaðirnar í ár.



*Ein sjáldsamur fiskur í kuldadiskinum í Miklagarði*
*Mynd: Álvur Haraldsen*

# Ein sjáldsamur fiskur

**Í gjár lá ein stór laksastyrja í kuldadiskinum í Miklagarði, sum fiskaslaktarin í SMS hevur keypt frá fiskasølufelagnum Fo-Fish í Saltangará**

LAKSASTYRJA
*Vilmund Jacobsen*
*vilmund@sosialurin.fo*

Laksastyrja er ikki vanligur fiskur í føroyskum sjógvi, men hetta er tó ikki fyrstu ferð, at hann er veiddur um okkara leiðir.

Fiskaslaktarin í Miklagarði, Flemming Palmus, sigur, at fiskamaturin í laksastyrju minnir um okkurt, sum liggur millum laks og tunfisk.

- Hetta er ómetaliga góður og vælsmakkandi fiskur, leggur hann aftrat.

At síggja til, er fiskurin í laksastyrju heldur myrkari enn í eitt nú laksi. Kanska minnir liturin meira um litin á royktum laksi.

### Fekst og roykt

Flemming Palmus sigur, at laksastyrjan verður seld sundurskorin í filét-stykkir, sum kunnu vendast í mjøli og leggjast á pannuna.

Men hann ætlar, at fólk, sum koma fram við í Miklagarði, eisini skulu sleppa at royna roykta laksastyrju.

- Eg fari eisini at roykja nøkur pettir av sjáldsama fiskinum, so fólk eisini sleppa at royna hann sum royktan.

Hann væntar, at styrjan sum filé verður seld fyri umleið 150 krónur fyri kilo við diskin í Miklagarði.

Laksastyrjan vigar umleið 60 kilo.

### Einaferð áður

Fiskaslaktarin byrjaði at arbeiða í Miklagarði í 1980 og var har fram til ár 2001.

- Nú havi eg aftur verið í Miklagarði í hálvt triðja ár, sigur hann.

Hetta er aðru ferð í søguni hjá Flemmingi Palmus sum fiskaslaktari í Føroyum, at tey hava fingið eina laksastyrju, og tað eru 15 ár, síðan teir høvdu ta seinastu.

- Hetta er so sanniliga ikki ein fiskur, sum liggur í diskunum hjá okkum á hvørjum degi, leggur hann aftrat.

### Fisk heim við

Tá Sosialurin vitjaði í Miklagarði seinnapartin í gjár, lá laksastyrjan heil í kuldadiskinum.

Fiskaslaktarin var so beinasamur at skera eitt pettið av styrjuni, sum hann síðan skar í stykkir, pakkaði og gav okkum heim við at royna.

- Mikumorgunin (tað er í dag), tá vit lata upp, kunnu fólk keypa burtur av laksastyrjuni, sigur Flemming Palmus.

Við uppí søguna hoyrir eisini, at enn hava vit ikki etið av laksastyrjuni, sum vit fingu frá fiskaslaktaranum í Miklagarði.



*Fiskaslaktarin sker »búffar« av laksastyrjuni*
*Mynd: Álvur Haraldsen*